## DAGSINS MEINING

# Vælkomin til Føroya

Hetta er tíðin, tá mong fremmandafólk vitja oyggjarnar í Norðuratlantshavi, sum Føroyar oftani verða nevndar. Ikki júst tí at veðurlagið er so innbjóðandi, men meira fyri at síggja stórslignu náttúruna og at hitta fólkið, sum býr á klettunum.

Umframt "vanligu" ferðafólkini, sum koma til landið, eru eisini "óvanligir" gestir. Ein teirra vitjar júst í hesi løtu. Tað er Lorreine Britten, einkjan eftir suðurafrikanara, sum í mong ár sat fangi í tí ræðuliga fangatippinum á Robbin Island. Hon er komin higar fyri at takka fyri tann stuðul, sum føroyska deildin av Amnesty International og her serstakliga fyrrverandi forkvinna tess, stríðskvinnan Anette Wang, lat í stríðnum móti hvíta apartheidstýrinum. Tað vóru millum brøvini frá henni, sum vóru við til at halda lív í vónini hjá Lorreine Britten at fáa mannin leysan úr fangilsi.

Henda søga undirstrikar bert tann týdning, sum Amnesty International hevur fyri so mong kúgað og ófræls úti í heimi, og at vit øll eiga at taka fult undir við arbeiðinum hjá hesum felagsskapi. Hóast tað kann kennast lítisvert at senda brøv út í heim til dikatur og einaræðisharrar, so er hetta kortini eitt ljós í myrkurinum hjá mongum. Tí eitt bræv verður oftani byrjanin til túsundtals brøv, ið verða send teimum, sum fremja ógerðirnar, úr øllum heimspørtum, herímillum Føroyum. Vitnanin hjá hesi góðu suðurafrikonsku kvinnu eigur nettupp eisini at minna okkum øll á tann týdning, sum m.a. arbeiði hjá Amnesty hevur. Lorreine skal vera hjartaliga vælkomin til Føroya.

Aðrir "óvanligir" gestir í hesum døgum eru donsku meistararnir úr FCK. Teir skulu eisini verða hjartaligar vælkomnir til Føroya. At frægi leikari okkara Todi er við í ferðalagnum ger hesa vitjan ikki minni áhugaverda. Tó at tað ikki eydnaðist Toda og liðfeløgum hansara at vinna ímóti KÍ. Hinvegin má sigast, at hetta er ikki eiti á føðingardagsgávu til hetta gamla og fræga felag, sum verður 100 ár í ár – at fáa ein sigur í hús móti donsku meistarunum. Tillukku KÍ bæði so og so. Og vælkomin til Føroya allir summargestir – vanligir sum óvanligir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerkingar til Sjóvar Kommunu

**Niels Martin Olsen**

Hví hendir so lítið í Sjóvar kommunu. Eftir seinasta kommunuval vóru flest allir strandingar spentir uppá , hvat hesi ungu fólk, sum vald blivu fóru at avrika. Nú er skjótt val aftur, og vit kundu ynskt okkum at meira var komið burtur úr - tóso, vit hava nýliga móttikið eitt hefti, sum vísir á ymiskt sum kommunan antin hevur fingið gjørt ella arbeiðir við at fáa gjørt - men tað eru nøkur ting eg fari at loyva mær at peika á við hesum skrivinum. Tað sigst at Sjóvar Kommuna er væl fyri fíggjarliga, men vil brúka peningin til at standa ímóti við, í ringum tíðum. Hetta er skilagott, men at skapa arbeiði t.d. fyri tey ungu vil eg eisini meina er skilagott.

Nú hava børnini fingið summmarfrí, og skuldi hetta verið ein upplagdur møguleiki hjá kommununi at fingið fríðkað um í bygdini. Men henda møguleika hevur kommunan valt frá - hví? hvat bleiv av "ung í arbeiði"?

**Hvat kundi verið gjørt?**

Vit hava eitt stórt øki rundan um bygdahúsið, sum í dag líkist mest eini oyðimørk, har kundi man til dømis planta nøkur trøð og sett nakrar benkur upp, og harvið gjørt hetta til eitt hugnaligt umhvørvið at koma til. Hugsið serliga um økið niðanfyri bygdahúsið. Tað er ikki so øgiliga nógv, sum skal til fyri at skapa trivna í bygdini.

Fara vit eitt sindur longur oman á hondbóltsvøllin, so liggur fult av graslíki har sum bara skal rullast út, betur hevði verði um eisini hegn bleiv sett upp rundan um vøllin. Hondbóltsvøllurin er sera væl egnaður hjá børnum og vaksnum at spæla sær á. Hetta er eisini nakað, sum tey ungu kundu gjørt.

Eitt annað, sum eisini kann nevnast, eru allar gongugøturnar, bygningar hjá kommununi, sum skula viðlíkahaldast, royta illgras sum veksur framvið øllum gongubreytum, eisini kundi man flutt hasa skrellispannina, sum hongur á hasum skeltinum uppi á fløtuvegnum."Haldi hon hongur á skeivari síðu..??? + sett enn fleiri skrelluspannur upp, sum eg haldi tit eisini nevna í heftinum tit sendu út. Her vóru í hvussu er nøkur konkret ting, sum kundu verði gjørd.

Haldi at tað er bæði synd og ein skamm, at man í sjóvar kommunu ikki hevur sett pening av til ung í arbeiði í summar.

Eitt uppskot kundi verði, at man deildi tey ungu upp í hold so øll sluppu framat. Tildømis kundi hvørt hold arbeitt 2 til 3 vikur í part.

Kann tað veruliga passa, at kommunan ikki hevur ráð at brúka eitt sindur av peningi til at fríðka um í bygdini? Og samstundis geva teimum ungu nakað av arbeiði sum bara er sunt fyri tey og sum fær tey at føla seg sum ein part av bygdartrivnaðinum.

Eg eri vælvitandi um at tit longu hava planir á borðinum viðvíkjandi t.d. hondbóltsvøllinum, men fyri okkum borgarar sær út sum at hetta ongantíð fer at blíva til nakað og hví ikki brúka tey ungu til hetta arbeiði?

Annars kann man siga at á Strondum er ikki so galið!!!

# Suðuroyggin

**Svenning Borg**
*Vágur*



At Suðuroyggin er illani fyri og serliga sunnara helvt av Suðuroynni er vist øllum greitt. Flakavirkið í Vági, sum var eitt tað mest framkomna í vesturheiminum, tá ið tað bleiv stongt, hevur ligið mest sum stilt í hesi tólv árini,síðan kreppan var.

Politikarnir stongdu tað, men fyri at fáa flakavirkið aftur at koyra, mugu politikkarnir eisini taka neyðug stig,til at tað letur upp aftur. Fiskavirking eigur at avtakast, tað var jú meiningin, at Fiskavirking bert skuldi vera til í eini trý til fýra ár, men sum ikki einaferð, so sviku politikkarnir.

Nú sæst í bløðunum,at samgongan er samd um, at Fiskavirking skal seljast samlað, altso øll virkini undir einum, um eini trý til fimm ár. Hvussu nógv flakavirkisfólk heldur samgongan eru eftir tá her suðuri hjá okkum?

Skulu tey veruliga bíða í fimm ár eftir at sleppa til arbeiðis.

Meina tykur í samgonguni, at henda støðan skal halda áfram í eini trý til fimm ár, at flakavirkið skal liggja virkisleyst í fimm ár til, tá eru tykur líka hugsjónarleysur sum undanfarna samgonga.

Flakavirkið eigur at blíva selt til áhugaðar vinnulívsmenn her á staðnum fyri ein prís, sum virkið kann forrenta, annað kann ikki koma uppá tal,fyrst tá verður arbeiði aftur á virkinum. Øll flakavirkini í Fiskavirking skuldu verði seld hvørt sær, til áhugaðar á staðnum,har íð tey liggja, fyri ein prís,sum virkini kunnu liva við.

Sølan av Fiskavirking átti ikki at snúð seg um, hvussu nógv í landskassin kann fáa burturúr at selja Fiskavirking,men heldur um, hvar í virkini gjørdu mest nyttu og góðu mest til tað øki, har í tey liggja.

Havi ofta ímyndað mær ,tann aktivitet,sum hevði verið í Suðuroynni,um til dømis fíggjarmálastýrið lá í Suðuroynni, 30-35 mill.kr. útgoldnar í lønum, hvat umsetning og trivna, íð tað hevði skapt, eitt umfar av pengum í oynni, sum hevði havt eina nógv størri vælferð, men men, her hava politikkarirnir so dyggiliga svikið, bæði lands og kommunalpolitikkarnir, her er ongi arbeiðspláss innan umsiting.

Johan Dahl skrivar í bløðunum um, at Suðuroyggin eigur at gerast eitt kraftsentur, eri púra samdur, saman við hinum samgongulimunum úr Suðuroynni kann Johan byrja hettar við at virka fyri,at komandi granskingarpark verður bygd í Suðuroynni.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Ternubølini verða skrásett

**Bergur Olsen**

Veit nakar um ternubøli, sum ikki eru merkt á kortið ?

Á sumri 2003 varð roynt at skráseta øll ternubølini í landinum, og mett varð eisini um støddina á hvørjum bøli. Øll bølini eru sett inn á kortið, men ivaleyst eru onkur ternubøli, sum vit ikki hava fingið við. Veit nakar um ternubøli, sum ikki eru merkt á kortið, hevði eg tí verið fegin at frætt um hetta á tlf. 222006. Eisini ber til at senda email til berguro@frs.fo.



### Ætlanin er at telja ternurnar á hvørjum ári

Ætlanin er at halda fram við hesi skráseting í nógv ár fyri at kanna, hvussu stovnurin broytist. Vit vita, at broytingarnar hava verið stórar, men tær eru ikki skrásettar. Í summum plássum hevur terna átt í langa tíð, meðan hon flytur nógv í øðrum plássum. Ikki er neyðugt at órógva ternurnar so leingi fyri at meta um, hvussu nógvar eiga í einum bøli. Nóg mikið er at fáa allar á flog og telja tær skjótt í luftini. Roknað verður so við, at fyri hvørjar tríggjar, sum eru á flogi eru tvey pør. Torført er tó at fáa eitt neyvt tal, meðan tær flúgva, men tað er nóg gott til at vísa tær árligu broytingarnar, sum vanliga eru stórar.

Fyrsta landsumfatandi teljingin av ternum fór fram í 1981, tá Dorete Bloch skipaði fyri eini fuglateljing, har 32 fuglateljarar luttóku. Tá vórðu 104 ternubøli funnin við tilsamans 1100 ternupørum. Seinasta summar funnu vit 67 bøli við tilsamans 7600 pørum. Higartil tykist tað, sum um minni er til av ternum í ár og at færri ternur hava vorpið, men teljingin er júst byrjað.

### Hvussu nógv kemur undan ?

Stórur munur er eisini á, hvussu nógvar ternupisur koma undan tey ymisku árini og hvussu tað eydnast í teimum ymsu bølunum. Seinasta summar doyðu pisurnar t.d. í Nólsoy og á Sandi, meðan eitt sindur kom undan í Kaldbak, Vestmanna og í Vágunum. Slíkar eygleiðingar taka longri tíð, men tað eru nógv fólk, sum fylgja væl við, hvussu gongst ternunum, har tey búgva. Kundu vit eisini savnað hesar upplýsingar á hvørjum ári frá summum bølum, høvdu tær givið eina góða ábending um, hvussu støðan er. Um onkur er áhugaður at luttaka í eini slíkari skráseting av ternunum í teirra øki, ella longu hevur slíkar upplýsingar liggjandi, eri eg sjálvandi eisini áhugaður at frætta frá teimum.

### Føðin hjá ternuni

Føðin, sum ternur geva pisunum, er mest ternumurtur og nebbasild, men av tí at ternan bert fær stoytt seg stutt niður í sjógvin, má fiskurin standa ovarlaga í sjónum, um ternan skal fáa fatur á honum. Ternan er tí meira viðkvom enn t.d. lundi og lomviga, ið kunnu kava djúpt eftir føðini. Tá ið lítið er til av ternumurti og nebbasild, gongur tað tí ógvuliga skjótt út yvir ternupisurnar, sum doyggja í hungri. Ein betri vitan um, hvussu ternurnar klára seg, er tí samstundis ein betri vitan um, hvussu stendur til í havinum.

### Norrønur sjófugladátugrunnur

Ternubølini verða skrásett í einum norrønum sjófugladátugrunni undir Fiskirannsóknarstovuni. Innsavningin av upplýsingunum fer fram í samstarvi við nógv fólk ymsa staðni í landinum, og skulu hesi hava stóra tøkk fyri tað. Formaðurin í Fuglafrøðifelagnum, Petur Mortensen, hevur verið sera íðin, og tveir týskarar, Jochen Schreiber og Nina Seifert, fylgdu gjølla við ternunum í Kaldbaksbotni seinasta summar og skrásettu og taldu nógv ternubøli.



# Sofus í Smiðjuni

Sofus Poulsen letur í dag upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hansara málningar eru bygdir út frá Elduvík.

– Framsýningin er ein tema-seria av føroyskum bygdalagi. Tað er ein ekspressionisma, sum alíkavæl hevur nógv við ljósið og tað føroyska landslagið at gera, sigur Sofus Poulsen úr Leynum.

Summar myndir eru grønligar, aðrar bláligar, meðan onkrar eru meira ljósar. Myndirnar eru hálvabstraktar bygdalags-variatiónir, sum Sofus Poulsen tekur til.

– Bygdin umboðar í veruleikanum rútmur og strikur. So tað verður ikki til nakra endurgeving av bygdini, men hálvabstraktar bygdalags-variatiónir, sigur Sofus Poulsen.



*Bygdin umboðar í veruleikanum rútmur og strikur. So tað verður ikki til nakra endurgeving av bygdini, sigur Sofus Poulsen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er ikki fyrstu ferð, at Sofus Poulsen er í Smiðjuni í Lítluvík. Seinnu seks árini hevur Sofus Poulsen havt framsýningar har.

Sofus Poulsen letur framsýningina upp klokkan tvey seinnapartin í dag, og hon verður opin til klokkan sjey á kvøldi.

**-hkm**

## Rætting

Í lesarabrævi hjá Sunrid Hentze 6. juli er eitt orð komið skeivt fyri. Setningurin skal byrja soleiðis: "Í Noregi gera politikarar alt fyri at fáa fólkið út aftur á smáplássini....."